16. september.

Vit eru gjørd varug við at onkur av krøvunum í útboðnum eru heldur langt frá okkara vanligu krøvum.

Tí hava vit valt at gera fylgjandi broytingar:

Ynski er at teldurnar við stórum skermi, eru sama merki sum tær við minna skerminum.

Minsta krav til Intel processarin verður broytt frá at verða Intel Core i5-1035G1 til at verða Core i5-10210U.

Kravi um at docking støðin skal verða Thunderbolt verður slept. Tað er tó framvegis eitt krav at docking støðin er USB-C dokkingstøð, ið hevur í minsta lagið 4 stk USB, gigabit LAN og 1 USBC (umframt tað ið verður brúkt at seta telduna til docking støðina). Eisini skal teldan við docking støðini stuðla 2 eksternum skermum tá teldan er dokkað við upploysn á 3840x1600

Vit eru blivin spurd um vit kunnu góðtaka Intel Core i5-8250U, av tí at onkur framleiðari ikki er farin at brúka 10. generatión enn.

Vit hava valt at góðtaka at brúka i5-8250U, men at tað kemur at telja niður í samlaðu metingini.